Bilar

Nr. 151 • hósdagur • 14. august 2003 • 77. árg.

Innan er gott pláss til tveir persónar
Mynd: Álvur Haraldsen

Smart CDI Passion:

Smartur lítil bilur til tvey

Smart CDI Passion. Ein lítil orkusparandi býbilur til tveir persónar, ið koyrir úti við 30 km/l
Mynd: Álvur Haraldsen

Fleiri hava ivaleyst lagt til merkis ein lítlan fittan bil, sum verður sýndur fram við Marknagilsvegin í Havn. Talan er um ein Smart Passion CDI, sum er ein eyðsýndur býbilur, ið koyrir úti við 30 km/l

BILAR
Magnus Gunnarsson

Smart er gjørdur út frá kanningum sum vísa, at tað sum oftast eru tvey fólk í teimum smáu bilunum, sum koyra inni í býunum.

Smart verkætlanin kom upprunaliga frá designmiðstøðini hjá Mercedes-Benz í USA, men tað vísti seg at Nicolas Hayek, stjórin á Swatch urverksmiðjuni í Sweits, hevði næstan sama hugskot. Hetta førdi til eitt samstarv millum Mercedes og Swatch um hendan lítla og orkusparandi býbilin. Eftir nøkrum árum tók Swatch urverksmiðjan seg úr hesum samstarvi, og í dag er tað DaimlerChrysler, sum eigur fyritøkuna. Bilurin verður gjørdur í Alsace í Fraklandi.

Smart er ein lítil bilur til tveir persónar, ið er 2,50 m langur, 1,51 m breiður og 1,53 m høgur. Tað vil siga at bilurin er lítið longri enn nógvir stórir bilar eru breiðir, og hann er líka høgur, sum hann er breiður. At byrja við gav tað, at hann er lutfallsliga høgur, trupulleikar við stabilitetinum í bilinum, serliga í svingum, men tað kom skjótt upp á pláss.

Smart fæst bæði sum bensin og diesel, bensinmotorarnir er upp á 0,7 litur, meðan dieselmotorurin er upp á 0,8 litur. Motorurin liggur oman á bakakslinum, og bilurin er bakhjólsdrivin.

Hóast Smart er ein minibilur, virkar hann ikki so lítil, tá man koyrir hann. Bilurin verður nógv brúktur í teimum stóru býunum í Evropa, har tað vegna plásstrot er sera hent at hava ein bil sum bert er tveir og ein hálvan metur langur og harvið lættur at parkera. Serliga konufólkini hava tikið væl í móti Smart. Bilurin fæst í ymiskum útgávum, eisini sum cabriolet.

Motorurin liggur oman á bakakslinum
Mynd: Álvur Haraldsen

Smart er bert 2,50 m langur, lítið meira enn ein stórur bilur er breiður
Mynd: Álvur Haraldsen

Smart CDI Passion

Motorurin:	0,8 litur 3 syl. CDI diesel við 41 hk
0-100 km/t:	19,8 sek
Oljunýtsla:	29,4 km/l
Dekkstødd:	135/70-15 framman
	175/55-15 aftan
Stødd og vekt	
Longd:	250,0 cm
Breidd:	151,0 cm
Hædd:	153,0 cm
Vekt:	800 kg
Viðførisrúm:	150 litrar
Prísur:	kr. 148.800,-
Søla:	Autoimport
	Tel. 217778

Citroën Berlingo Multispace Mudutop:

Sum í einum flúgvara

Í fjør bleiv Citroën Berlingo, sum kom fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, broyttur bæði uttan og innan
Mynd: Álvur Haraldsen

Citroën Berlingo kom fyrstu ferð á marknaðin í 1996. Bilurin bleiv beinanvegin væl móttikin av barnafamiljunum í Evropa og aðrastaðni. Í fjør bleiv Berlingo broyttur bæði uttan og innan

BILAR
Magnus Gunnarsson

Nýggi Berlingo fæst í útgávunum Advance og Multispace. Multispace fæst so aftur í útgávunum Modutop og Clim, sum gera bilin meira praktiskan og brúkaravinarligan, við tað at plássið undir loftinum er so væl útnyttað.

At seta seg inn í ein Berlingo í Modutop útgávuni er sum at koma inn í eitt flogfar, har eru ikki minni enn fimm loftvindeygu, fleiri hillar, skáp við lúkum, og ventilatiónsdysir. Til tey ferðandi á baksetr-

BILATORGIÐ

Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag

KIA SEPHIA 1.5 GTX
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m.. Kr. 66.000.
Tilboð uttan bil í býti
kr. 56.000,-

TOYOTA LANDCRUISER DIESEL
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur.
Kr. 28.000,-

FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN
Árg Okt. 95, Kr. 60.000.
Tilboð uttan bil í býti
kr. 50.000,-

KIA K 2700 LASTVOGNUR KING CAB 2700 DIESEL 3.200 KG
Árg 21. Juni 2001, Km 38.500. Aircondition - Centrallás - C.D.Anlegg - Sleipikrók- Differentiale sperru - eyka tectylviðgjørdur - Klæddur við plátum innv. í lastini. v.m.
NÝPRÍSUR: 190.300,-
Kr. 125.000,-

SUZUKI WAGON R 1.2
Árg Maj 00, Km 42.000. C.D Anlegg- El rútar- El.spegl- Síðuspoylarar- Takspoylara- sleipikrók- pikadekk v.m.. Kr. 86.000.
Tilboð uttan bil í býti
kr. 76.000,-

HONDA CIVIC
Árg Sept .2001, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v.hita -Radio - Fjarstýrt centrallás v.m.
Kr. 145.000,-

ROVER 620 GSDI 2.0 T.DIESEL
Árg Dec. 99, Km 146.800. Leður setur- Aircondition- Fjarstýrt- centrallás- El. Sóltak- El. rútar- El. spegl Alufelgur v.m.
Kr. 150.000,-

Pf. D. B. Bilar
Jónas Brongksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650

RÚMLIGUR 7 PERSÓNA FAMILJUBILUR

MERCEDES BENZ 230 TE
Árg 1991, Km 118.000. Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggir el-rútavindarar. Søluprísur: kr. 149.000. Nærri upplýsingar fáast við at ringja á
tlf. 216135

MERCEDES-BENZ 190 D - 2,0 DIESEL
Árg 1989, Km 270.000. Bilurin er í góðum standi, koyrir 15,0 km/l. Kr. 75.000.
tel. 447175 ella 217175

CITROËN JUMPY 1,9 TD
Árg 1999, Km 69.000. Sera væl hildin vøruvognur. Innrættaður til handverkara. Til sølu um hóskandi boð fæst.. .
Ringið tel. 371937 ella 211937